# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Osvald Hansen farin foldum frá



Tað kom mær dátt við at hoyra sagt. Osvald Hansen, meistari á SEV-verkinum ikki var millum okkum meira.

Vit komu at kennast á smiðjuni MEKA í Fuglafirði, maskinskúlanum í Tórshavn, og A. P. Møller »Rosa Mærsk«. útisiglan.

Osvald var maðurin sum var góður at spyrja til ráðs, svaraði spurningum skilliga, eg sigi fyri mín part skyld, Osvaldi fór eingin feil av í arbeiði.

Tað er eingin ivi um, at Osvald hevði gjørt sína skyldu her á fold á ein og annan hátt.

Vísti síni kynstir og dirvi í allar mátar.

Eru dagarnir taldir – hvat so?

Vónin er eftir, mótvind fær tú neyvan yvir lívsins hav.

Góða heimreisu.

**Albert**



## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
í stóru sorg okkara, tá høgt elskaði sonur okkara,
beiggi, ommu- og abbasonur

**Ernst Wesenberg Sivertsen**
Hoyvík

so tíðliga bleiv kallaður heim til Harran.

Tøkk til Bergur D. Joensen prest, fyri troystarrík
og góð orð í heiminum og kirkjuni.
Tøkk til tykkum øll, sum bóðu fyri Ernst og okkum,
tykkum sum vitjaðu okkum bæði á Ríkissjúkrahúsinum
og heima, tykkum sum ringdu, skrivaðu
og sendu heilsanir á ymiskan hátt.
Tøkk til tykkum, sum gjørdu tað møguligt hjá okkum
at verða heima við Ernst í millum viðgerðir
og tað seinastu tíðina.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar og vakran einstakan
sang í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur
til Krabbameinsfelagið.
Tøkk til tykkum øll, sum skipaðu fyri ervinum
og hjálptu til við jarðarferðini, tykkum í Oasuni
og ikki minst til Hoyvíkar Skúla.
Hjartans tøkk øll somul.
Tøkk til hvønn einstakan av tykkum
í tí stóru mannfjøld , ið fylgdu Ernst
á hansara seinastu ferð her á fold.
Má Harrin signa tykkum øll.

*Familjunnar vegna*

**Ann Mari, Hans Jákup, Rani, Andreas og Maria**

## Tøkk

Eg vil takka fyri sýnda samkenslu tá mín góði pápi
og verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Jakob Oluf Jakobsen**
vanliga nevndur Mester
Fuglafjørður

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum vóru í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og øll tykkum,
sum á annan hátt vóru um okkum,
ein serlig tøkk til tín Anna.
Vit takka fyri blómur, kransar og peningagávur
til Parkinsonfelagið.

*Við ynski um einar gleðiligar páskir*

**Birgit, Òla Chr., Súsanna, Njal, Poula, Bogi, Fríði og Jenny**

## Tøkk

Eina hjartans tøkk fyri sýnda samkensku,
tá elskaði maður og pápi okkara

**Dánjal Petersen**
í Gerðinum
Vestmanna

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum á Hotel Tórshavn, B7 og
Hæmatologisk ambl. fyri tykkara stóru umsorgan
undir sjúkraleguni.
Tøkk til Marjun Bæk fyri troystarrík orð í
kapellinum og í kirkjuni.
Til sangarar, berarar og urguleikarar,
somuleiðis ein hjartans tøkk.
Tøkk til tykkum sum sendu blómur,
kransar og fjarrit.
Eisini vilja vit veita eina hjartans tøkk til tykkum,
sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini og
sum stukku inn á gólvið.
Somuleiðis ein hjartans tøkk til tykkum mongu,
sum fylgdu Dánjal til hansara seinasta hvíldarstað.

**Halbjørg og Súsanna**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ovi Leo úr Vági** andaðist á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi hósdagin 6. apríl, 87 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Gerdu Drangastein, Haldarsvík**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum í kvøld klokkan 18. Jarðaferðin verður úr Haldarsvíkar kirkju leygardagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Gerdu kunnu lata Haldarsvíkar kirkju eina peningagávu. Konta í Føroya Banka.

**Anna Maria Mikkelsen**, vanliga nevnd Mia á støðini, Syrðugøta, fer til gravar úr Filadelfia leygardagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Miu, kunnu lata eina peningagávu til Filadelfia í Gøtu. Konta í Føroya Banka.

**Alice Hansen, Rituvík**, andaðist í heiminum mikukvøldið 5. apríl, 70 ára gomul.

**Gerda Drangastein, Haldarsvík**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 5. apríl, 77 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 18. Jarðaferðin verður úr Haldarsvíkar kirkju leygardagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Gerdu, kunnu lata Haldarsvíkar kirkju eina peningagávu. Konta í Føroya Banka.

**Bina Svartá, Saksun**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 5. apríl, 93 ára gomul.

**Dagurin**

**8. apríl. Janus**. Navnið er ókent í halgimannatali; sipar helst til ein Januaris í Suðuritaliu, sum varð tikin av døgum. Venseslaus Ulricus Hammersheimb doyði hendan dagin í 1909, og Kristian Osvald Viderø doyði hendan dagin í 1991.

**9.apríl. Procopius**. Talan er kanska um tann Prokorus, sum er nevndur í Ápostlasøguni 6,5. Segðist vera bróðursonur Stefans.

**10. apríl. Ezekiel**. Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla testamenti. Navnið merkir Guð er sterkur.



Lesið Sosialin so eru tit við